# Reglugerð
# fyri leiðararáðið í
# Føroya Pedagogfelag

**§ 1 Limir leiðararáðsins, val og valbæri.**

Í Føroya Pedagogfelag verður skipað leiðaráð sambært ásetingunum í hesari reglugerð.

Leiðararáðið í Føroya Pedagogfelag telur 5 limir.

Fyri at kunna gerast limir í leiðararáðnum skal viðkomandi persónur vera limur í Føroya Pedagogfelag og starvast sum leiðari innan sáttmálaøki felagsins.

**§ 2**

Leiðararáðið verður valt á fundi, sum hildin verður á hvørjum ári eftir regluliga ársaðalfundin í Føroya Pedagogfelag. Leiðararáðið skipar fyri fundinum.

Allir leiðarar, eindarleiðarar og varaeindarleiðarar, sum eru limur í Føroya Pedagogfelag og starvast innan sáttmálaøki felagsins kunnu møta á fundinum. Leiðarar, eindarleiðarar og varaeindarleiðarar eru vælbærir og hava atkvøðurætt. Nevndarlimirnir í Føroya Pedagogfelag hava eisini rætt at møta á fundinum.

Limirnir verða valdir fyri tvey ár í senn og kunnu afturveljast.
Limir í leiðararáðnum verða valdir umboðandi dagstovnaøkið og serøkið, minst ein fyri hvørt øki.
Hvørt ár verða trýggir tiltakslimir valdir fyri eitt ár í senn, minst ein fyri hvørt øki.

Leiðararáðið skipar seg við formanni, næstformanni og skrivara.

**§ 3 Endamál og heimildir leiðararáðsins.**

Endamálið hjá leiðararáðnum eru at røkja fakligu áhugamálini hjá leiðarunum.
Leiðararáðið hevur m.a. heimild at kunna um rættindi og skyldur, kunna um leiðslu og námsfrøði og á annan hátt, alt innan karmarnar av fíggjarjáttanini, hesi reglugerð, avgerðum frá nevndini og lógum felagsins.

Leiðararáðið hevur heimild at samskifta við felagið vegna leiðararnar og at umsita játtanina sum nevnd er í grein 6.

## § 4 Leiðararáðið - nevndin.

Leiðararáðið skal verða ráðgevandi fyri nevndina í viðurskiftum, sum hava við sáttmálaviðurskifti og starvsviðurskifti leiðaranna at gera.

Nevndin og leiðararáðið skipa fyri minst fýra fundum árliga, at samskifta um spurningar, sum hava felags áhuga. Nevndin kallar inn og ger skrá sambært ynskjum frá nevnd og leiðararáð.

## § 5 Leiðararáðið - umsiting felagsins.

Eftir tørvi kann nevndin avgera, at leiðararáðið fær hjálp frá umsiting felagsins til ítøkjulig mál.

Eisini kann nevndin gera almennar leiðsreglur fyri í hvønn mun ráðið kann leita sær hjálp hjá umsitingini.

## § 6 Fíggjarligu karmar leiðararáðsins.

Nevndin í Føroya Pedagogfelag ásetur á hvørjum ári fíggjarkarmin fyri virksemið hjá leiðararáðnum.

Nevndin kann innan fíggjarkarmarnar játta fígging til samsýning fyri fundir, ítøkjulig mál og almemt til virksemi ráðsins.

Treytin fyri fíggjarligari játtan er, at leiðararáðið í seinasta lagi 1.desember á hvørjum ári sendir nevndini eina fíggjar- og virksemisætlan til góðkenningar. Hvørt ár skal ráðið lata nevndini uppgerð yvir hvat játtanin ítøkjuliga er brúkt til.

## § 7 Samtykt og broyting av reglugerðini.

Hendan reglugerð er samtykt av nevndini í Føroya Pedagogfelag tann 28. Apríl 2014.

Nevndin í Føroya Pedagogfelag hevur heimild at broyta og taka av hesa reglugerð, men áðrenn nøkur broyting/avtøka verður framd, skal leiðararáðið hava høvi at koma við sínum viðmerkingum.

Nevndin:

Maud Wang Hansen, forkvinna

Jógvan Philbrow, næstformaður

Bjarni Beder, skrivari

Elin N. W. Tausen, nevndarlimur

Irdi Lið Gaardlykke, nevndarlimur

Tórshavn
28.4.2014